# Starvsskipan fyri Búskaparráðið

## Alment
Sambært § 2 í løgtingslóg frá 5. mai 2021 um Búskaparráð er landsbankanevndin Búskaparráð, og sambært § 4 røkir Landsbankin skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

Landsbankin hevur sína egnu starvsskipan og henda starvsskipanin er fyri Búskaparráðið.

Henda starvsskipan kann broytast eftir uppskoti frá ráðslimum, um meiriluti er fyri broytingaruppskotinum. Broytingarnar fáa gildi fyri Búskaparráðið, tá ráðið hevur samtykt tær.

Uppgávan hjá Búskaparráðnum er at fylgja við í búskaparligum viðurskiftum í landinum og koma við óheftari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Virksemið er útgreinað í §3 í lógini um Búskaparráð.

## Ráðið
Nevndin í Landsbankanum er samstundis Búskaparráð. Sambært § 2, stk. 2 í løgtinglóg um Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð frá 24. november 2016, er ráðið skipað við 5 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri 3 ár.

Vísandi til § 2, stk. 2 í landsbankalógini, velur landsstýrismaðurin formannin.

Eingin av nevndarlimunum (og harvið ráðslimunum) kann vera í stjórn ella nevnd fyri fíggingarstovnar og tryggingarfeløg. Á heimasíðu Landsbankans verður upplýst, hvørjum øðrum arbeiðið ráðslimirnir eru partar av, sum ikki er teirra dagliga arbeiði.

Ráðgevingini frá Búskaparráðnum skal sambært lógini vera faklig og óheft. Um ráðslimur verður biðin at luttaka í øðrum arbeiði enn teirra dagliga arbeiði, eigur ráðslimurin at siga frá í Búskaparráðnum, sum so viðger, um tað er í stríð við óheftni hjá ráðnum.

## Stjóri
Landsbankin er skrivstova hjá Búskaparráðnum. Ynskir Búskaparráðið eina uppgávu ella arbeiði loyst, verður tað avtalað við stjóran.

Umsitingin í Landsbankanum fyrireikar konjunkturfrágreiðingar og evnisfrágreiðingar, sum Búskaparráðið viðgerð.

Búskaparráðið luttekur í fyrireikingini í tann mun ráðið metur tað neyðugt og ráðið kann eisini sjálvt fyrireika og gera evnisfrágreiðingar um ráðið metur tað neyðugt.

## Roknskaparviðurskifti
Hetta er viðgjørt í starvsskipanini hjá Landsbankanum

## Kunning

Formaðurin kunnar ráðið, tá hann verður biðin um at hava framløgur á ymiskum tiltøkum/ráðstevnum og um neyðugt viðger evni saman við ráðnum áðrenn framløguna. Somuleiðis kunnar formaðurin í Búskaparráðnum so vítt møguligt ráðið, tá hann verður biðin at úttala seg í fjølmiðlunum.

## Hvør úttalar seg vegna Búskaparráðið

Formaðurin í Búskaparráðnum, úttalar seg vegna Búskaparráðið og økið hjá ráðnum. Formaðurin kann útdelegera hetta til onnur í ráðnum ella stjóran í Landsbankanum. Í ivamálum, um hvørt økið hoyrir undir Búskaparráðnum ella Landsbankanum, verður avtalað, hvør úttalar seg frá ferð til ferð.

## Ógegni – egin áhugamál

Ráðslimur skal vera opin um síni serligu áhugamál, um eitt av hesum málum er til viðgerar í Búskaparráðnum. Hetta fyri at tryggja at opinleiki er í kjakinum

Hevur ráðslimurin serlig áhugamál í evni, sum verður viðgjørt av Búskaparráðnum, verður tað fráboðað í frágreiðingum, notatum og øðrum, at ráðslimurin ikki hevur luttikið í arbeiðnum.

## Tagnarskylda

Limir í Váðaráðnum, starvsfólk í Landsbankanum, hjálparfólk og onnur, ið gera arbeiðið fyri Landsbankan, hava skyldu (undir ábyrgd sbr. § 152 og §§ 152c-152f í revsilógini) at halda trúnaðarupplýsingar loyniligar, sum tey fáa kunnleika umgjøgnum sítt virksemi. Hetta er eisini galdandi eftir at starvstíðin o.a. er lokin. Nevndarlimir koma undir somu tagnarskyldu.

Búskaparráðið

Tórshavn, 23/06 - 2025